Fylgiskjal 1:

**Protokol um broyting í sáttmálanum millum Føroya landsstýri og Grønlands sjálvstýri at sleppa undan tvískatting, hvat viðvíkur inntøku- og ognarskattum**

Føroya landsstýri og Grønlands sjálvstýri,

- sum ynskja at gera eina protokol um broyting av sáttmálanum frá 30. august 2000 at sleppa undan tvískatting, hvat viðvíkur inntøku- og ognarskattum (hereftir nevndur "sáttmálin"),
- sum ásanna, at tey málsøki, sum hesin sáttmáli fevnir um, hoyra undir Føroya landsstýri og Grønlands sjálvstýri,

eru samd um:

**Grein I**

Inngangurin til sáttmálan verður strikaður og í staðin kemur:

"Føroya landsstýri og Grønlands sjálvstýri,

sum ynskja at gera sáttmála fyri at sleppa undan tvískatting, hvat viðvíkur inntøku- og ognarskattum (hereftir nevndur "sáttmálin") uttan at skapa fyritreytir fyri ikki-skatting ella skerdum skatti umvegis skattaundandrátt ella skattaflýgging, (herundir umvegis sonevnda "treaty shopping", sum sipar til at persónar, sum eru búsitandi í einum ríki, sum ikki er partur av hesum sáttmála, óbeinleiðis fáa fyrimun av hesum sáttmála),

sum ásanna, at hvat viðvíkur málsøkjum, sum hesin sáttmáli fevnir um, hoyra undir Føroya landsstýri og Grønlands sjálvstýri,

eru samd um:"

**Grein II**

Aftaná Kapittul V verður settur nýggjur kapittul:

**"Kapittul Va**

**Almennar reglur um skatting**

**Grein 23a**

Uttan mun til hinar ásetingarnar í hesum sáttmála skal ein fyrimunur sambært sáttmálanum ikki kunna njótast í spurningum um eina inntøku ella ogn, um tað við atliti til allar viðkomandi umstøður er rímiliga sannlíkt, at eitt av høvuðsendamálunum við fyriskipanini ella tiltakinum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis førdi til fyrimunin, var at fáa fyrimunin. Hetta er tó ikki galdandi, um tað verður staðfest, at njótanin av fyrimuninum í hesum førinum er í samsvari við sáttmálans endamál og ætlan."

**Grein III**

Stykki 1 í grein 25 (**Mannagongd, tá ið sínámillum avtalur verða gjørdar**) verður strikað og í staðin kemur:

"Um ein persónur metir, at í einum ella báðum sáttmálabundnu londunum verða samtykt átøk, sum fyri hann bera í sær ella koma at bera í sær skatting í stríð við ásetingarnar í hesum sáttmála, kann hann, uttan at hetta ávirkar rætt hansara at brúka tey rættarráð, sum eru í innanhýsis rættarskipanunum í londunum, leggja málið fyri málsráðandi myndugleikan í einum av sáttmálabundnu londunum. Málið skal leggjast fram innan trý ár frá tí tíðspunkti, viðkomandi persónur gjørdist varugur við ta atgerð, sum førdi til skattingina, sum er í stríð við ásetingarnar í sáttmálanum."

**Grein IV**

1. Hendan protokol kemur í gildi tann dagin, bæði londini hava undirskrivað hana.
2. Protokollin fær tó í fyrsta lagi virknað tann dag, Løgtingið hevur samtykt hana.
3. Henda protokol er galdandi, so leingi sáttmálin er í gildi.

Til staðfestingar av hesum hava undirritaðu við fullgóðari heimild skrivað undir hesa protokol.

Skrivað í ávikavist Tórshavn og Nuuk tann 19. januar 2019 í einum eintaki á donskum, føroyskum og grønlendskum, sum øll hava sama gildi.

Nuuk, den 20/2- 2019

For Naalakkersuisut

Vittus Qujaukitsoq

Tórshavn, tann 20 / 2-2019

For Føroya landsstýri

Kristina Háfoss